## DAGSINS MEINING

# Ongantíð aftur!?

Tjakfundurin um kreppuna í nítiárnum var bæði áhugaverdur og spennandi og tað tænir útvarpinum til heiðurs at hava skipað fyri hesum fundi. Hóast fundurin var væl fyriskipaður, so vóru bert fáir spurningar frá fundarfólkinum og tað var spell. Tað vóru politikkararnir og serfrøðingarnir, ið domineraðu fundin, men tað var væl ikki annað enn væntað. Hetta er í hvussu er ein táttur, sum útvarpið eigur at halda fram við og betra. Serstakliga útvarp men eisini sjónvarp hava sera stóran fólksligan týdning, tá tað ræður um kjak og orðaskifti. So tað skal vera okkara áheitan á loftmiðlarnar um í størri mun enn í dag at leggja dent á orðaskiftið og tá heldur brúka minni orku og pengar uppá tíðindapartin, hóast hann eisini hevur stóran týdning.

Gjørdust vit so klókari av fundinum og fingu vit nakað at vita, sum vit ikki vistu frammanundan? Bæði ja og nei. Embætismenninir góvu okkum eina mynd av einum vinnulívi, sum er nógv betur fyri enn áðrenn kreppuna og teir vissaðu opkkum um, at eingin kreppa kemur aftur í bræði. Men millum reglurnar hómaði tann gløggi lurtarin eitt lítið "men kanska" og "ikki beinan vegin". Hartil fingu lurtararnir ta fatan, at vinnulív, bankar og tað almenna eru so væl konsolideráð, at vit saktans kundu klára eina minni kreppu. Eisini fingu vit at vita, at fíggjarligi sektorurin ongantíð aftur kundi kollapsa, sum hann gjørdi í nítiárunum. Hetta er sjálvsagt sissandi at hoyra, og vit kunnu bert vóna, at hetta heldur og samstundis vóna, at vit ongantíð koma at royna hendan pástand í praksis.

Men hóast hesa bjørtu mynd, so standa nakrir spurningar eftir, sum ikki gjørdust heilt greiðir ella sum vilji ikki er at loysa. Ein var spurningurin um tey, sum flýddu av landinum og sum enn ikki eru komin aftur. Talan er um eini 5000 fólk. Fundurin gav teimum onga vón, hóast vit innflyta arbeiðsmegi. Tað er bæði grøtiligt og átaluvert, at løgmaður einki boð hevði uppá ein útveg fyri hesum fólkum. Annar ivaspurningur snýr seg um ALS. Hvat gera vit nú? Er ALS nú nóg sterk til at klára eina kreppu, sum ikki kemur, men kanska kemur kortini sum frá líður. Er útgjaldið rímiligt? Er inngjaldið rímiligt? Hvørjum gagnar ALS mest – teimum arbeiðsleysu ella búskaparpolitikkinum? Ein triði spurningurin snúði seg um fiskivinnupolitikkin og ein fjórði um fíggjareftirlitið. Hvørgin hesin var svaraður nøktandi. Víst varð á grundleggjandi skeivleikar, sum løgmaður ikki kundi svara nøktandi uppá. Her er talan um sera álvarsamar spurningar, sum vit fara at venda aftur til – vónandi saman við øðrum miðlum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Prælúdium?

**Sunleif Rasmussen**



Tá ið ein hevur valt at liva sum yrkislistafólk á hesum kargu klettum í norðuratlantshavinum, má ein hava gott tol, tjúkka húð og sera vælútviklaðar gávur at bera yvir við fólki.

Nú er tað so ymiskt hvussu víðan sjónarring menniskju hava. Víður sjónarringur hevur aloftast við sær stórt tolsemi fyri tí, ið er fremmant og ørvísi. Hetta er tíðanverri ikki tað, ið hevur merkt almenna kjakið um m.a. list í seinastuni. Tó skal her leggjast afturat, at andaligt trongskygni ikki er eitt serføroyskt fyribrygdi. Hinvegin vísir tað seg, at andaligt trongskygni og fordómar trívast sera væl í politisku skipanini her á landi.

Aloftast tá ið vit tosa um andaligheit, verður hugsað um tann partin, ið fer fram í samkomum og kirkjum. Við anda verður í hesari viðmerking sipað til alt tað, ið ikki er materia.

Andaligt trongskygni kemur til sjóndar, við at vit menniskju taka dagar ímillum hvør andaligheit er »tann rætta«. Fordómar koma til sjóndar við at vit døma áðrenn vit kenna nóg nógv til tað, ella tey vit fella dóm yvir. Felags fyri hesi bæði eyðkennini er at vit byggja upp eina svart/hvíta tilveru, har mín máti at hugsa ella »vera« er »tann rætti«. Har eg ongan hug havi at seta meg inn í, og tíðansheldur skilja tað ella tey, ið eru mær fremmand.

Har trongskygni og fordómar gerast ein altavgerandi partur av orðum og gerum hjá einstøkum menniskjum, bólkum ella politiskari skipan, kann tað lættliga blíva vandamikið. Tað hava vit sæð so mangan, og gjørdi hetta seg eisini galdandi í løgtinginum nú ein dagin, tá ið tveir løgtingsmenn, ein (javn-aðarmaður) og ein fólkaflokksmaður, skutu upp á tingsins røðarapalli at skerja stuðulin til Leikpall Føroya, tí leikbólkurin Gríma spældi ein sjónleik, hvørs innihald, hesir báðir hildu vera forkastiligt. Tað at brúka tingsessin til hóttanir um at skerja stuðul til ávísar listagreinir, bert tí ein ikki er einigur í ella skilir innihaldið, er sera óvanligt í teimum londum vit vanliga samanlíkna okkum við. Tó skal sigast, at vit hava sæð víðgongdar høgrapopulistiskar politikkarar koma við slíkum úttalilsum, men hesir hava ongan livandi kjans at koma í nakra stjórn her um leiðir.

Nú hevur javnaðarflokkurin, í yvirlýsing, tikið avstand frá tí sum (javnaðartingmaðurin) segði, og tøkk skulu tit hava fyri tað. Tó rokni eg ikki við, at fólkaflokkurin ger tað sama. Og tað er her vit sklul vera á varhaldið. Hesin flokkur hevur síðan fyrst í sjeytiárunum ført eina miðvísa herferð ímóti allari nútíðarlist og teimum fólkum sum henni vara av. Men harvið seti eg ikki allar fólkaflokksveljarar í sama bás, og langt frá tí.

Uppskriftin er sera einføld. Bólkar verða settir upp ímóti hvørjum øðrum, har summir hava tað "rætta" at bjóða. Uppskriftin er eisini klassisk. Eitt gott dømi er mentunnarpolitikkur Sovjetsamveldsins. Valdsharrarnir settu út í kortið hvat var "tann rætta" listin. Alt annað bleiv forfylgt, fordømt og forboðið við lóg. Tað sama gjørdi seg galdandi í Týsklandi í tríati og fýrati árunum.

Slíkur víðgongdur og trongskygdur mentunnarpolitikkur kann ikki førast í einum fólkaræðið sum tí føroyska. Men tíðiligt er, at tað eru kreftir í politisku flokkunum í Føroyum, har tankar eru frammi, ið bera óhugnaliga nógv á henda bógvin.

Tað skal tí vera mín áheitan á allar kreftir í politisku skipanini í Føroyum, ið vilja víðskygni fram um trongskygni, um at standa saman um at føra ein miðvísan mentunnarpolitikk, til frama fyri alt lista og mentunnarlívið í Føroyum. Kanska einamest tí listini, ið vísir okkum á fremmandar leiðir, har vit ikki hava verið fyrr.

# Forkert udlægning Hr. Ludvigsen

**Páll Poulsen**
*Tórshavn*



Hr. Erik Ludvigsen skriver i tirsdagsudgaven om udgaven »Løgtingið 150« år. Han forsøger at påvise at der i dobbeltudgaven foreligger nye forskningsresultater. Det passer ikke. Du burde i foreliggende udlæg hellere koncentrere dig om udtalelsen og ladningen af ordet "løsrivelse". Hvem er det der skal "løsrives" og fra hvilket skal der løsrives?

Hr Sølvarás gentagelse om løgnen af den danske enhedsstat bliver da gentaget allerede i indgangen m. henh. til at Færøerne er et dansk amt.

Selve ingrediensen er ikke andet end gedigent klamhuggeri, der ikke bærer noget nyt under solen. Udgaven er en festudgave der er kommet for at justificere ombygningen af det færøske lagting og dets dybeste ambition er at legitimere visse personers lidet kulinariske eksistens. I andet bind findes der faktuelle fejl som f. eks lagtingsformand Poulsens fødselsdato er en dag forskudt.

Som Cand. Jur. burde du hellere koncentrere dig om »Hjemmestyrsloven«´s folkeretlige ophav. Hvem har sat den i kraft og hvordan? Og virkede den overhovedet? Jeg forstår ellers godt at bøgerne sælges som overskudslager.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Mugu brynja okkum við toli

ANALYSA - OLJULEITING
*Jan Müller*

Úrslitið av tí seinastu boringini hinumegin markið mundi koma óvart á mong. Tey, sum høvdu væntað, at her var talan um "knald eller fald" eru helst farin skeiv, tí henda boringin er liður í eini boritilgongd, sum fyri okkara viðkomandi ikki meira enn hevur traðkað sínar barnaskógvar. Síggja vit Føroyaøkið isolerað, hvat vit tó ikki eiga, so eru bert boraðir tríggir brunnar her. Samanborið við einar 150 brunnar fyri alt økið vestan fyri Hetland. Enn standa so fimm brunnar og bíða og skulu teir allir borast innan veturin 2006.

Aftrat hesum kemur, at umleið 8 kanningarbrunnar skulu borast beint upp at markinum á bretskum øki, eisini komandi árini. Tvs. at tað komandi tvey til fýra árini er uppá tal at bora einar 13 kanningarbrunnar báðumegin markið. Hesir fara sjálvandi at útvega eina rúgvu av upplýsingum og vera við til at stykkja saman puslispælið um møguligar oljukeldur á hesum stóra økinum á Atlantsmótinum. Tað skal vera løgið, um ikki onkur av boringunum verður eitt veruligt fund, nú ein virking oljuskipan er í umráðinum. Er man eitt sindur bjartskygdur og kanska eisini realistiskur, so er ikki skeivt at gita og siga, at rakstrarverdugt fund verður gjørt innan tvey ár eru farin.




*Ilt er at spáa um framtíðina, eins ringt er at finna oljuna*

Næsta ár kemur túrurin til Agip, sum skal hava gjørt sítt forarbeiði sera væl - og við vitanini frá hinum brunnunum og teimum nýggjastu 3D kanningunum, skilst, at Agip hevur góðar vónir. At Texaco so um somu tíð fer at bora ein kanningarbrunn beint hinumegin markið ger ikki støðuna minni áhugaverda. Hesar báðar boringar hava annars einki við hvørja aðra at gera. (Sí eisini kort á síðu 14, sum vísir brunnar, sum eru boraðir og brunnar, sum verða boraðir komandi árini). Men at tær verða boraðar um júst somu tíð og í sama umráði kann koma at skapa stóran áhuga fyri økinum. Eitt fund her ella har kann seta alt økið í nýtt fokus. Tí hava hesar boringar og fyri okkum ikki minst tann hjá Agip stóran týdning fyri at varðveita kontinuitetin í leitingini.

Tað er eingin ivi um, at heldur laka úrslitið hjá Amerada Hess og hinum feløgunum í hesum mánaðinum psykologiskt er eitt afturstig fyri leitingina á Atlantsmótinum. Tað eggjar ikki júst øðrum feløgum til at venda eyguni henda vegin, og tað fær kanska heldur ikki nøkur av verandi feløgunum til at síggja alt ov ljóst uppá framtíðina. Men hinvegin so eru hetta stór oljufeløg, sum eru von við at arbeiða í nýggjum økjum og von við bakkøstum ella sagt øðrvísi - von við at tað skulu borast nógvir brunnar, áðrenn tú fær eitt veruligt rakstrarverdugt fund. Vit skulu ikki gloyma, at tað vórðu boraðir meira enn 30 brunnar í norskum øki, áðrenn rakstrarverdugt fund varð gjørt. Og vestan fyri Hetland vórðu boraðir meira enn 70 brunnar, áðrenn lønandi fund varð staðfest og farast kundi undir útbygging. Boringin her byrjaði fyrst í 70-unum og kortini hava feløgini ikki slept økinum. Higartil eru tvey felt í framleiðslu, Foinaven og Schiehallion og farið er undir at útbyggja tað triðja, Clair, sum er ein risi í oljuhøpi. Tosað verður eisini um at fara undir útbygging av Suilvenøkinum, sum liggur norðan fyri Schiehallion og ikki so langt frá markinum heldur.

So far so good. Men brúk er fyri eini væleydnaðari boring, einum fulltreffara í hesum stóra økinum, ikki so langt úti í framtíðini, um áhugin og kontinuitetурin skal varðveitast. Tað kann jú henda, at okkurt av feløgunum, sum hava boriforpliktilsi, vilja sleppa burtur úr teimum. Og tá er at standa fast, sum Elttør jú sigur. Onkur hevur gitt, at BP kanska vil sleppa sær burtur úr sínum boriforpliktilsum í Føroyum og hinumegin markið, her tað stendur til at bora íalt fýra brunnar, sum hvør kanska kostar einar 200 mill. kr. Hetta er neyvan endaliga upp á í løtuni, tí enn er ov tíðliga at sleppa endanum, nú boringar vísa eina virkna oljuskipan. Tær 13 boringarnar komandi árini fara heilt vist at geva eina nógv betri heildarmynd av jarðfrøðini og uttan iva onkur fund. Hinvegin er BP so mikið virkið á Atlantsmótinum, tað er í veruleikanum tað, sum drívur verkið, sum heldur lív í leitingini, er lokomotivið fyri bæði leiting og framleiðslu, at tað neyvan fer at sleppa takinum við eitt. Bretlandi tørvar at finna meiri olju, tí goymslurnar minka og vónirnar til, at Atlantsmótið skuldi fylla í aftur goymslurnar, eru neyvan heilt burtur, tó at tað eru væl minni eftir nakrar turrar/hálvturrar brunnar. Uttan iva bíða teir hjá BP eins og hinum oljufeløgunum, sum eru virkin her, við stórum áhuga eftir teimum næstu boringunum báðumegin markið, henni hjá Agip og tí hjá Texaxo næsta summar.

So fyri tey, tað verið seg vinnuna, fólk sum heild og ikki minst politikararnar, sum síggja fram til eina komandi oljuvinnu, er bara at gera sum oljumálaráðharrin hevur lært seg uttanat: at brynja seg við toli.

Fyri teir føroyingar, sum hava sett pengar í Atlants Kolvetni og í Føroya Kolvetni er tað tó ikki bara ein spurningur um, hvussu leingi tað ber til at liva við slíkum toli. Tí so peningaveik og lítil hesi feløgini eru, hóast tey ikki hava somu skyldur, so hava tey ikki eins og stóru oljufeløgini møguleika til bara at bíða. Fyrr ella seinni er eginpeningurin uppi, tí var tað sjálvandi eitt bakkast fyri Atlants Kolvetni, at hesin seinasti brunnurin ikki vísti nakað meira. Men harvið nýtist tað ikki at blíva nøkur vanlukka. Helst ber til at bíða til 2004 eftir úrslitinum av tí boringini, men skuldi hon eisini endað uttan eitt veruligt fund, so er ilt at meta um møguleikarnar hjá felagnum. Trupulleikin er jú tann, at tað hevur onga inntjening og tá so er, er tað eisini ein spurningur um, hvussu leingi man kann bíða. At úrreiðslurnar kanska ikki eru ovurstórar hjálpir sjálvandi. Men hini oljufeløgini, sum eru her, hava jú virksemi nógva aðrastaðni at dúva uppá. Kanska var tað ikki so heppið, tá umboð fyri felagið, eftir fund varð gjørd á landgrunninum, í fjølmiðlunum vórðu endurgivin í einum yvirpositivum anda um, at nú vórðu partabrøvini túsundtals meira verd osfr. Tað ræður um at vera realistiskur og hava tunguna mitt í munninum, eisini tá tað sær ljóst út. Soleingi talan ikki er um lønandi fund eru slík úttalilsi óheppin.

Og hvat Føroya Kolvetni, sum er partur av Agipsamtakinum, víðvíkur, so er eisini ein spurningur, hvussu leingi tað hevur ráð til at bíða. Nú fáa vit so at síggja, hvussu fer at ganga tí at útvega neyðuga partapeningin at vera við í komandi boringini. Og hvussu fer at ganga at fara úr teimum 7% uppí í tey 22. Rakar Agip í blett og Føroya Kolvetni er við við 22% so er tað sum at vinna í lottarínum. Men oljuvinna er nevniliga eisini lottarí-spæl, sum kann ganga báðar vegir. Og oftast tann skeiva vegin. Livst so spyrst ella sum onkur segði: spyrst so livst.